# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Fyri 30 árum síðan:

## Øll verða góð við Opal



*Sverri Egholm og Johanna Maria Djurhuus*

*Kelda: Sosialurin 21. november 1979*

Í Sosialinum mikudagin 21. november 1979 er ein grein um ein nýggja sjónleikin "Øll verða góð við Opal", sum verður frumsýndur leygarkvøldið í Sjónleikarhúsinum.

Leikurin er ein skemtiligur leikur um eina gamla konu, sum býr einsamøll. Peningaliga ríkidømi hennara royna tveir brotsmenn at ræna. Hetta er fyrsti leikurin, sum Havnar Sjónleikarfelag sýnir fram í ár.

Leikararnir hava vant í seks vikur undir leiðslu av danska leikstjóranum Jan Hertz, sum hevur útbúgving úr fleiri londum. Leikurin er eftir amerikanska skaldið John Pattrick. Umsett til føroyskt hevur Elin Súsanna Jacobsen.

*-red*

## Mítt fyrsta Trøllasavn




Trølla Pætur og omma hansara koma nú út við filmssavninum „Mítt fyrsta Trøllasavn".

Seinastu 10 árini hava Trølla Pætur og garvilla omma hansara, givið út heili fýra filmar. Nú eru allir hesar filmar savnaðir í eina dós, sum eitur „Mítt fyrsta Trøllasavn". Flest øll í Føroyum kenna filmarnar "Hon er omma mín","Hvar er Nósi", "Jólini hjá Trølla Pæturi" og "Trølla Pætur og Mafian". Nú ber til at ogna sær allar filmarnar hjá Trølla Pæturi og Ommuni í eini og somu dós.

Niclas Heri Jákupsson í Klaksvík sigur í stuttari viðmerking, at Trøllasavnið fæst á Magn støðunum kring landið. Frá fríggjadegnum 4. desember og fram til jóla ber til at ogna sær hesa dós á øllum Magn-støðunum í Føroyum. Leygardagin 5. desember fara trøllini at hava konsertir og skriva autografar á hesum Magn-støðum: Í Klaksvík kl. 11, í Gøtudali kl. 14 og við Ringvegin kl. 17.

Tað verður rock and roll fyri allar pengarnar, sigur Trølla Omman, gleðir seg til at heilsa upp á øll børnini.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at

**Olga Guttesen**
ættað úr Vági
búsitandi í Tórshavn

andaðist í heiminum týsdagin, 74 ára gomul.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum leygardagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Rúni Joensen v/ fam.**

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jan Larsen, Ebeltoft í Danmark,** andaðist í heiminum sunnudagin, 46 ára gamal. Tey, ið vilja minnast Jan, kunnu lata børnunum eina gávu. Konta í Eik, 155.663.2

**Olga Guttesen, ættað úr Vági, búsitandi í Tórshavn,** andaðist í heiminum týsdagin, 74 ára gomul.

**Símun Bjarnason Højgaard, ættaður av Skála, búsitandi á Strondum,** andaðist mánadagin, 72 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju leygardagin kl. 13.

**Jákup Hansen, Klaksvík**, andaðist í Århus hósdagin 26. november, 55 ára gamal. Bønarhald verður í kapellinum á Århus Kommune-hospital, Peder Sabroesgade 18A, fríggjadagin kl. 14.

**Ulla Aakjær, Tvøroyri**, andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi týsmorgunin, 77 ára gomul.

# MERKISDAGAR

**95 ára føðingardagur**
Mánadagin 7. des. fyllur Hans Jacob Johannesen, Skipari, Tórshavn, 95 ár. Dagurin verður hildin í Miðstovu á Láargarði millum kl. 17 og 20.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 4. des. hava Kirsten og Daniel Næs, Hvalba, diamantbrúðleyp. Tey, sum vilja heilsa uppá diamantbrúðarparið eru vælkomin hjá Monu og Eliesar, Toftavegur 15, frá kl. 14-19.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 5. des. kunnu hjúnini Edith og Páll Klettskarð, í Haraldssundi, halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Haraldssundi í millum kl. 12 og 17. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Mánadagin 7. des. hava hjúnini Óluva og Leivur Nielsen, Tórshavn, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J.H. Schrøtersgøta 9 í Tórshavn. Vinir og kenningar, ið vilja halda dagin saman við okkum, eru vælkomin í Starvsmannafelagið 7. des. kl. 18.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 7. des. hava Anna og Kári Egholm Jacobsen, Glyvrar, verið gift í 25 ár. Veitsla verður 19. des. í Bygdarhúsinum í Leirvík fyri innbodnum.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 8. des. hava hjúnini Lis og Herluf Olsen, Sørvágur, verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. halda við bæði, Pálin og Henry Olsen, Rituvík okkara silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við veitslu í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tit, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 219134 (Henry) ella 223534 (Pálin). Til ber eisini at senda ein teldupost: henry-o@olivant.fo ella palin.olsen@skulin.fo áðrenn 15. desember.

**Dagurin**

3. desember. Sveinur. Teir vita einki um halgimenni við hesum navni. Norrønt navn ið merkir ungur maður.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*